## Ein óvanlig tíðarkoyring

FORMEL 1

Regn og alsamt vaksandi vatnmongdir á breytini vóru karmarnir, har ein tann løgnasta byrjunarrøðin í formel 1 var avgjørd. Teir bilarnir, ið vóru fyrstir á breytini høvdu bestu viðurskiftini, og soleiðis endaði Ralf Schumacher á sína fyrstu fremstu byrjunarstøðu fyri Toyota. Jenson Button fekk aðru byrjunarstøðu í BAR-Honda, hetta merkir at japanskir motorar høvdu báðar fremstu støðurnar. Men eisini Christian Klien í Red Bull Racing í fjórðu støðu, og heimsmeistarin Alonso sum nummar sekstan, og Montoya, Räikkönen og Trulli aftast, var heldur óvæntað.

Trulli og Monteiro koyrdu útav, meðan ringu umstøðurnar gjørdu at Montoya valdi ikki at koyra umfarið og Räikkönen koyrdi so spakuligt, at hann endaði síðstur. Tað regnaði serliga illa at endans, hetta gekk útyvir teir, sum endaðu fremstir seinast. Kimi Räikkönen skifti motor fríggjadagin, og skuldi tí flyta 10 støður aftur í byrjanini, men nú endaði hann síðstur, og sleppur sostatt undan hesum.

Alt hetta legði upp til eina sera spennandi koyring við hópin av yvirhálingum. Serliga tí sunnumorgunin var turt í veðrinum, og 25 hitastig í Japan.

**nud**

### Byrjunarstøða á Suzuka

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Ralf Schumacher | Toyota |
| 2. | Jenson Button | BAR- Honda |
| 3. | Giancarlo Fisichella | Renault |
| 4. | Christian Klien | Red Bull Racing |
| 5. | Takuma Sato | British American Ra±cing Honda |
| 6. | David Coulthard | Red Bull Racing |
| 7. | Mark Webber | Williams-BMW |
| 8. | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas |
| 9. | Rubens Barrichello | Ferrari |
| 10. | Felipe Massa | Sauber-Petronas |
| 11. | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota |
| 12. | Antonio Pizzonia | Williams-BMW |
| 13. | Christijan Albers | Minardi-Cosworth |
| 14. | Michael Schumacher | Ferrari |
| 15. | Robert Doornbos | Minardi-Cosworth |
| 16. | Fernando Alonso | Renault |
| 17. | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes |
| 18. | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes |
| 19. | Jarno Trulli | Toyota |
| 20. | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota |




*Ralf Schumacher var ein glaður maður, tá hann leygardagin tryggjaði sær fremstu byrjunarstøðu fyri Toyota*

# Sera spennandi í Suzuka

**Kimi Raikkonen í McLaren-Mercedes vann formel 1 koyringina á Suzuka framman fyri Giancarlo Fisichella og Fernando Alonso í Renault bilunum**

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Takuma Sato rendi ikki færri enn tvær ferðir á bilar á heimavølli. Her skumpar hann Jarno Trulli av breytini, og varð aftan á koyringina diskvalifiseraður*

Endaúrslitið av formel 1 koyringini við Raikkonen fremstum og báðum Renault bilunum í hølunum á honum, tykist sum eitt rættuliga vanligt úrslit í ár. Hetta er hóast alt sjeyndu ferð, at Raikkonen vinnur í ár, og í fjúrtan av teimum átjan koyringum higartil hevur Renault havt ein ella tveir koyrarar á skammlinum. Men koyringin á Suzuka breytini var als ikki vanlig.

### Sera spennandi

Talan gjørdist um eina tí mest spennandi formel 1 koyringina í nógv ár, við eini rúgvu av yvirhálingum, tøttum nærdystum, og stórum hetjum. Tað skiftandi veðrið í tíðarkoyringini blandaði kortini á ein ørvísi hátt, soleiðis at báðir Mclaren bilarnir og Fernando Alonso í Renault byrjaðu heilt aftast. Meðan Ralf Schumacher byrjaði fremstur frammanfyri Jenson Button og Giancarlo Fisichella í hinum Renault bilinum.

Í sjálvari koyringini var turt, og áskoðarin slapp at uppliva eina ørgrynnu av yvirhálingum, stóru hetjurnar vórðu Kimi Raikkonen, sum vann av seytjandu byrjunarstøðu og Fernando Alonso sum hóast óheppið val av pittstoppstrategi, megnaði at fáa triðja pláss av sekstandu byrjunarstøðu.

### Villeneuve fekk nóg mikið

Í sjálvari byrjanini, vóru tað serliga fýra mans, ið gjørdu vart við seg, David Coulthard, Michael Schumacher, Fernando Alonso og Juan Pablo Montoya. Coulthard fór av sættu byrjunarstøðu upp á triðja pláss, men misti tó triðja pláss aftur til Button løtu seinni. Schumacher fór av fjúrtandu byrjunarstøðu upp á sjeynda pláss, og Alonso, sum byrjaði sum nummar sekstan, lá beint í hølunum á Schumacher á áttanda plássi. Montoya, ið byrjaði av átjanda plássi, fylgdi við Schumacher og Alonso, men Jaques Villeneuve á níggjunda plássi, var eftir øllum at døma troyttur av at verða yvirhálaður, og koyrdi Montoya av breytini. Fyri hetta fekk Villeneuve eftir koyringina eina tíðarrevsing á 25 sekund, sum vórðu løgd afturat úrslitinum. Hetta flutti Villeneuve av ellinta aftur á tólvta pláss. Óhappið hevði við sær, at trygdarbilurin kom á breytina.

### Sato rendi á nakrar ferðir

Fyri Takuma Sato og Rubens Barrichello gjørdist byrjanin serliga óheppin, teir rendu saman uttan fyri breytina, tá báðir royndu at koyra ov skjótt gjøgnum fyrsta sving. Báðir punkteraðu og noyddust tí í pit, at skifta dekk.

Takuma Sato megnaði at gera seg enn meira óynsktan í formel 1, tá hann við síni tiltiknu ófantaligu koyring, trýsti Jarno Trulli av breytini. Hetta førdi við sær, at Sato aftan á koyringina varð diskvalifiseraður og misti sítt trettanda pláss.

### Giancarlo á odda

Ralf Schumacher byrjaði av fyrstu byrjunarstøðu, og helt oddasessin trygt, áðrenn ein sera óheppin pitstrategi beindi fyri hansara vónum um ein sigur, og enn einaferð vístu Toyota, at teirra bilar í koyringini detta stútt niður ígjøgnum stigini. Tá Ralf Schumacher fór í pitt á tólvta umfari, legði Giancarlo Fisichella seg fremst, og lá á odda inntil seinasta umfar. Pitstrategiin hjá Kimi Raikkonen hjálpti væl við at flyta hann upp á annað pláss, men honum tørvaði onga hjálp, tá hann við eini framúr yvirháling fór framvið Giancarlo Fisichella á seinasta umfari og tók sigurin.

Mark Webber í Williams-BMW sannførdi. Hann byrjaði av sjeynda plássi, og fór tvey pláss upp í byrjanini, hann var verandi í stigunum alla koyringina, og tryggjaði sær fjórða pláss. Hetta er sera flott fyri Williams bilin, ið hevur verið lítið sannførandi seinastu mánaðarnar.

### At sleppa framvið Schumacher

Í koyringini var Michael Schumacher gáttin, sum bæði Raikkonen og Alonso skuldu framvið, og hetta hevði við sær einki minnið enn nakrar frálíkar nærdystir. Serliga Raikkonen hevði trupulleikar við at sleppa framvið eldra Schumacher beiggjanum.

Christian Albers í Minardi mundi gerast sera heitur um oyrini tá eldur kom í formel 1 bilin hjá honum, tá hann stóð í pit og fekk bensin, eingin fólkaskaði hendi, og eldurin varð sløktur beinanvegin.

### Úrslit á Suzuka

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | 10 stig |
| 2 | Giancarlo Fisichella | Renault | 8 stig |
| 3 | Fernando Alonso | Renault | 6 stig |
| 4 | Mark Webber | Williams-BMW | 5 stig |
| 5 | Jenson Button | BAR- Honda | 4 stig |
| 6 | David Coulthard | Red Bull Racing | 3 stig |
| 7 | Michael Schumacher | Ferrari | 2 stig |
| 8 | Ralf Schumacher | Toyota | 1 stig |
| 9 | Christian Klien | Red Bull Racing | |
| 10 | Felipe Massa | Sauber-Petronas | |
| 11 | Rubens Barrichello | Ferrari | |
| 12 | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas (fluttur 1. pláss aftur) | |
| 13 | Robert Doornbos | Minardi-Cosworth | |
| 14 | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | |
| 15 | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota | |
| úti | Takuma Sato | British American Racing Honda (diskvalifiseraður) | |
| úti. | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | |
| úti | Antonio Pizzonia | Williams-BMW | |
| úti | Jarno Trulli | Toyota | |
| úti | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes úti | |

### HM fyri koyrarar

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 123 |
| 2 | Kimi Räikkönen | 104 |
| 3 | Michael Schumacher | 62 |
| 4 | Juan-Pablo Montoya | 60 |
| 5 | Giancarlo Fisichella | 53 |
| 6 | Jarno Trulli | 43 |
| 7 | Ralf Schumacher | 39 |
| 8 | Rubens Barrichello | 38 |
| 9 | Jenson Button | 36 |
| 10 | Mark Webber | 34 |

### HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault F1 | 176 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 174 |
| 3 | Scuderia Ferrari | 100 |
| 4 | Toyota Racing | 82 |
| 5 | Williams-BMW | 64 |
| 6 | BAR Honda | 37 |
| 7 | Red Bull Cosworth | 30 |
| 8 | Sauber Petronas | 17 |
| 9 | Jordan Toyota | 12 |
| 10 | Minardi Cosworth | 7 |